# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Tað sum gagnar barninum

Fátt er sum faðir- einki er sum móður, sigur eitt gamaltføroyskt orðatak. Tað er henda lívsáskoðan, sum hevur verið støðið undir gomlu ríkislógini um foreldramyndugleika. Henda lóg gevur mammuni foreldramyndugleikan, um foreldrini ikki eru gift. Tað er lítil ivi um, at tíðin er farin frá hesari lóggávu. Tíðin er eisini farin frá revsirættinum, ið sambært galdandi lóg gevur foreldrum rætt at sláa børn síni.

Landsstýrið hevur í løgmansrøðuni boðað frá, at ætlanin er at leggja galdandi donsku lóg um foreldramyndugleika fra 1995 fyri løgtingið, og skal henda lóg geva meira javnstøðu millum pápa og mammu í málum um foreldramyndugleika. Men nú er komið fyri dagin, at henda lóg ikki tá ið samanum kemur, javnsetir bæði foreldur. Atfinningarnar byggja á úrslitini av rættarmálum, har mammurnar vinna flest mál. Vit loyva okkum at halda, at tað, sum altíð eigur at viga mesta, er atlitið til barnið. Tann avgerð, ið er best fyri barnið, eigur altíð at vera altavgerandi, og eigur øll lóggáva at hava hetta fyrilit.

Um tað hinvegin er nakað um, at 1995 lógin ikki virkar, sum upprunaliga ætlað, og danska stjórnin er á veg við eini nýggjari lóg, sum verður meta at vera gagnligari fyri allar partar, serataklioga barnið, so er einki forgjørt í at bíða eitt sindur. Vísir tað seg, at henda komandi lógin er betur hóskandi til okkara viðurskifti, so eigur hon at verða sett í gildi í Føroyum. Hinvegin kunnu vit ikki bíða alt ov leingi, tí verandi lóg er púra óhóskandi, og tað hevur veruliga skund at fáa sett bann fyri at sláa børn. Her má berast skjótt at. Kannast má, nær nýggja lógin kemur og so er at hava ríkislógartilmælið um føroyska gildiskomu klárt í somu løtu. Men myndugleikar mugu í øllum hesum ikki gloyma tað, sum er og verður altumráðandi, og tað bert er tað, ið gagnar barninum mest, ið eigur at liggja til grund fyri avgerð um foreldramyndugleika.

**Sosialurin**

# Hygg í spegilin Finnur Helmsdal!

**EIRIKUR LINDENSKOV**
blaðstjóri á Sosialinum



**Tað er ein hóttan móti fólkaræðinum, tá ein løgtingsmaður ferð eftir ferð setir fram ósannar skuldsetingar móti fjølmiðlum og fjølmiðlafólki**

Í Sosialinum mánadagin hevur Finnur Helmsdal, løgtingsmaður fyri Tjóðveldisflokkin eitt aftursavar upp á eina oddagrein í Sosialinum í síðstu viku. Oddagreinin var ein reaktión upp á skuldsetingar, framsettar av Finni Helmsdal á løgtingi í sambandi við umrøðuna av ólavsøkurøðu løgmans, har hann segði, at »fleiri tjóðveldisfólk hava verið útihýst í Sosialinum í fleiri ár«. Hann vil vera við, at vit her á blaðnum beinleiðis úthýsa lesarabrøvum og viðmerkingum frá ávísum tjóðveldisfólkum, t. d. Finni Helmsdal sjávlum.

Eftirsum at eg eri blaðstjóri á Sosialinum, so havi eg rættiliga stórt innlit í, hvussu vit handfara slíkt her á blaðnum. Og eg kann vátta, at tað er beinleiðis lygn, sum Finnur Helmsdal førdi fram – og sum hann so ofta áður hevur ført fram.

Eg fari at biða Finn Helmsdal spyrja onnur tjóðveldisfólk, um tey kenna trupulleikan. Spyr formann Høgna, um hann kennir seg tilsíðissettan ella útihýstan úr Sosialinum. Spyr Hergeir, spyr Heidi, spyr Páll, spyr Tobba, spyr Karsten, spyr Annitu, ella spyr Jógvan Arge ella Leiv Hansen. Spyr tey, um tey kenna tað sama sum tú, at ávís tjóðveldisfólk ikki fáa síni lesarabrøv í Sosialin!

Vit eru menniskju eins og tú Finnur! Eg skilji á lagnum, at tú følir, at vit gjørdu tær órætt í maimánað í 1998. Júst hatta málið minnist meg ikki. Men tað kann væl vera, at vit hava gjørt ein feil. Tað hendir hjá okkum, eins væl og hjá tær, Finnur, tí tú gert eisini tínar feilir, minst til tað!

Um so er, at vit hava gjørt tær órætt einaferð, so er tað ikki vist, at hetta er ein tilvitað gerð, beinleiðis rættað móti Finni Helmsdal til tess at útihýsa tær úr Sosialinum.

Fyri at siga tað akkurát sum tað er, so kundi tað ikki fallið okkum inn at gjørt slíkt. Ikki ein gong í móti tær, Finnur, tó at tú fert so illa við okkum í leiðsluni á Sosialinum og annars sker starvsfólkini á blaðnum yvir ein kamb.

Kringvarpið visti í gjár at siga, at Danmark er tað landið í heiminum, har fjølmiðlarnir hava størsta frælsi. Eg vildi ynskt, at so eisini var í Føroyum, men við politikarum sum tær, so er pressufrælsið í stórum vanda. Tú ert tilfeldigvís løgtingsmaður. Tað merkir, at tú telist millum lógarsmiðirnar. Tá slík fólk soleiðis í tíð og ótíð leggja eftir fjølmiðlunum og fjølmiðlafólkum – fólkum sum geva sítt íkast fyri fjølmiðlarnir dag og dagliga og soleiðis gera sítt til at uppihalda fólkaræðinum, so er veruligur vandi á ferð.

Eg haldi sjálvur, at tað er nokso langt úti, at tú ikki ein gong kanst ringja á Sosialin og spyrja, um vit hava gloymt eitt lesarabræv ella røðu hjá tær í 1998, heldur enn ferð eftir ferð at leggja eftir okkum og leggja okkum undir líkt og ólíkt. Faktiskt er hetta nokso primitivt, serliga tá havt verður í huga, at tú ert løgtingsmaður. Og at tú segði ósatt í tinginum hendan dagin, tað prógvar tú jú sjálvur, tá tú sigur, at »seinastu árini havi eg tí bert sent Dimmalætting og Oyggjatíðindum greinar mínar...«. Hvussu skulu vit útihýsa tær, tá tú ikki sendir okkum tínar greinar???

Og so tosar tú um at vera persónligur! At niðurgera teg persónliga! Álvaratos, Finnur Helmsdal. Tú hevur sjálvur feliri ferðir niðurgjørt okkum á Sosialinum – eisini okkara persónligu fíggjarligu viðurskifti hevur tú niðurgjørt. Tað haldi eg vera nokso langt úti, serliga tá man hevur so lítið innlit í slík víðurskifti, sum tú hevur víst at tú hevur.

Ikki tí, Finnur. Eg haldi, at eg kenni teg nokso væl, og tí perlar øll hendan sinnisrørslan hjá tær av mær rættuliga skjótt. Men eg haldi kortini, at hetta er nokso primitiv. Tú ert trods alt løgtingsmaður, so tú burdi havt størri format.

Men eg skilji, at ein ávís hending í 1998 – altso fyri átta árum síðani, hevur hildið sinni tínum í kók síðani – at tú ert meira ímintur, enn eg hevði ímyndað mær!

Men míni ráð góði Finnur: Gang í teg sjálvan, hygg í spegilin... og spyr teg sjálvan:

- Kunnu slíkir menn byggja land?

P. S. Finnur Helmsdal skal hava ta rós, at hann í nógvar mátar er ein skilagóður og dugnaligur politikari. Um onkur fær ta fatan, at mær ikki dámar persónin, so er tað als ikki so, tí Finnur Helmsdal er í nógvar mátar ein hampamaður. Trupulleikin er bara tær einoygdu brillurnar, sum hann átti at lagt frá sær einaferð med alla. Tað hevði gagnað honum bæði persónliga og politiskt!

# Felags/ikki felags foreldramyndugleiki

**SOFUS K. JOENSEN**
Kollafirði

Nú tað aftur verður tosað um felags foreldramyndugleika, har bæði mamman og pápin skulu hava felags avgerðarrætt yvir barninum, fari eg at koma við nøkrum hugsanum, eg havi gjørt mær hetta 10-ára skeiðið, ið er gingið, síðan eg bleiv fráskildur. Eg haldi, at vit skulu hugsa okkum øgiliga væl um, áðrenn vit nerta við verðandi lóg.

Vit mugu minnast til, at tað er eitt viðbrekið evni vit tosa um, og eg hugsi ikki um moral ella etik, men um børnini! Børnini verða tey, ið tað svíður harðast hjá. Eg hugsi ikki, at tá talan er um felags foreldramyndugleika, at tørvurin hjá børnunum stendur fremst í huganum hjá fólki. Hvat ólukkan hevur ein lógarvending at siga fyri eitt barn?? Børnini vilja hava bæði foreldrini saman, og eitt barn skilir ikki ein lógartekst. Barnið

*Framhald á næstu síðu*

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.